# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Leiðandi yvirlækni til Medisinska depilin

Starvið sum leiðandi yvirlækni á Medisinska deplinum á Landssjúkrahúsinum er leyst at søkja til setan 1. januar 2008 ella eftir avtalu.

Á Medisinska deplinum eru 62 sengur, sum eru uppbýttar á partar fyri kardiologi, lunga- og nýra-sjúkum, onkologi og reumatologi, gastroenderologi, endokrinologi, hematologi og neurologi, langtíðarmedisinsk og uppafturvenjing og medisinsk pediatri.

Í starvi á Medisinska deplinum eru 8 yvirlæknar, herav 2 barnalæknar + 5 ósett størv, umframt 9 yngri læknar. Av teimum yngru læknunum eru 3 turnuslæknar og 2 introduktiónslæknar. Hini størvini eru ikki klassifiserað.

Tað eru umleið 4.700 innleggingar um árið. Ambulatoriumsvirksemið á Med. deplinum umfatar diabetesambulatorium, gastroenterologiskir, kardiologiskir, lungamedisinskir, hematologiskir, onkologiskir og nefrologiskir sjúklingar hjá teimum ávísu yvirlæknunum. Føroya lungaklinikk verður passað av yvirlæknunum í deildini. Til depilin hoyrir ein kliniskur fysiologiskur/nuclear-medisinskur partur og eitt kardiologisk ambulatorium við arbeiðs-EKG og ekkokardiografi. Hesi passa bæði innlagdar og amublantar sjúklingar. Tað eru umleið 10.000 ambulantar viðtalur um árið.

Depilin hevur avtalur við aðrar serlæknar um regluligar konsulentvitjanir innan økini onkologi, mikrobiologi, klinisk kemi, barnaneurologi og barnaortopedi. Tað reumatologiska og dermatologiska ambulatoriumið verður fyribils røkt av konsulentum. Konsulenttænasta innan neurologi verður passað 3 ferðir um vikuna av privatpraktiserandi neurologi. Á deildini eru 3 dietistar og ein sosialráðgevi í starvi.

**Depilsleiðslan**
Leiðandi yvirlæknin er saman við leiðandi sjúkrarøktarfrøðinginum depilsleiðslan í Medisinska deplinum, har tað eru umleið 220 starvsfólk. Leiðandi yvirlæknin hevur endaligu ábyrgdina og myndugleikan til at taka avgerðir viðvíkjandi tí fíggjarliga og fyrisitingarliga, men væntað verður, at avgerðirnar verða tiknar í semju. Leiðandi yvirlæknin hevur ovastu ábyrgdina fyri:

- menning innan tað læknafakliga økið
- at tað fer fram frálæra, útbúgving og menning innan serfrøðina hjá deplinum

**Kvalifikatiónir**
Ynskið er, at starvið verður sett við serlækna, sum er §14 kvalifiseraður, og sum er tilreiðar at ganga inn í vakt við hinar yvirlæknarnar. Væntað verður, at umsøkjarin hevur leiðslu- og fyristingarligar royndir og er sinnaður støðugt at menna síni leiðsluevni.

Tað er ein treyt, at umsøkjarin hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða tvørfakligt. Umsøkjarin skal verða kveikjari og fyrimynd fyri samstarvspartarnar og áseta mál til aktivitetirnar hjá deplinum. Effektivitetur, tilfeingistilvitan, virkisfýsni og úrslitssøkni eru týðandi førleikar. Somuleiðis skal umsøkjarin tryggja innan- og uttanhýsis samstarv og samskifti.

**Lønar- og starvstreytir**
Setunarmyndugleikin er sjúkrahúsleiðslan.

Starvið er áramálsavmarkað til 6 ár og kann leingjast eftir umsókn.
Protokollat nr. 3 "Ansættelsesvilkår ved åremålsansættelse af lægelige chefer" í avtaluni millum "Amtrådsforeningen og Foreningen af Speciallæger", er eisini galdandi fyri hetta starv. Ískoytið smb. sama protokollat er í løtuni 8.565,39 kr. um mánaðin.
Starvið er sett inn á skalastig 52 smb. avtalu millum FAS og Fíggjarmálaráðið frá 19. september 2005.

**Fleiri upplýsingar**
Starvs- og virkislýsing fæst við at venda sær til Helenu Skaalum Mikkelsen, leiðsluskrivara, telefon 304500, lokal 1011. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jón á Steig, leiðandi yvirlækna, lokal 6100, t-postur jas@lsh.fo, Tummas í Garði, læknastjóra, lokal 1002, t-postur tig@lsh.fo ella til Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, lokal 1003, marinv@lsh.fo.

**Ynskið er, at starvið kann setast** av einum breitt útbúnum serlækna í internum medisini og relevantari serfrøði, helst lungamedisin, endokrologi, reumatologi, onkologi ella neurologi, men birt verður eisini undir umsøkjarar við aðrari serfrøði at søkja starvið.

**Umsóknarfreistin er** 22. november 2007.

## Leiðandi yvirlækni til Skurðdepilin

Starvið sum leiðandi yvirlækni á Skurðdeplinum á Landssjúkrahúsinum er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt ella eftir avtalu. (Umsøkjari við gynekologi ella oyra- næsa- og hálsasjúkum sum serfrøði hevur fyrimun).

Skurðdepilin umfatar serfrøðirnar ortopedkirurgi, gynekologi og obstetrik, parenchym kirurgi, íroknað urologi og plastikkirurgi, oyra-, næsa og hálsasjúkur, eygnasjúkur og tannlæknavirksemi.

Depilin hevur 12 yvirlæknar í starvi, harav 2 eygnalæknar og ein ONH-lækna (+ eitt ósett ONH-læknastarv) umframt 7 yngri læknar. Yngru læknarnir eru mannaðir við 4 turnuslæknum og einum introduktiónslækna. Hini bæði størvini eru ikki klassifiserað.

**Depilsleiðslan**
Leiðandi yvirlæknin er saman við leiðandi sjúkrarøktarfrøðinginum depilsleiðslan í Skurðdeplinum, har tað eru umleið 100 starvsfólk. Leiðandi yvirlæknin hevur endaligu ábyrgdina og myndugleikan til at taka avgerðir viðvíkjandi tí fíggjarliga og fyrisitingarliga, men væntað verður, at avgerðirnar verða tiknar í semju. Leiðandi yvirlæknin hevur ovastu ábyrgdina fyri:

- menning innan tað læknafakliga økið
- at tað fer fram frálæra, útbúgving og menning innan serfrøðina hjá deplinum

**Kvalifikatiónir**
Ynskið er, at starvið verður sett við serlækna, sum er §14 kvalifiseraður, og sum er tilreiðar at ganga inn í vakt við hinar yvirlæknarnar. Væntað verður, at umsøkjarin hevur leiðslu- og fyristingarligar royndir og er sinnaður støðugt at menna síni leiðsluevni.

Tað er ein treyt, at umsøkjarin hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða tvørfakligt. Umsøkjarin skal verða kveikjari og fyrimynd fyri samstarvspartarnar og áseta mál til aktivitetirnar hjá deplinum. Effektivitetur, tilfeingistilvitan, virkisfýsni og úrslitssøkni eru týðandi førleikar. Somuleiðis skal umsøkjarin tryggja innan- og uttanhýsis samstarv og samskifti.

**Lønar- og starvstreytir**
Setanarmyndugleikin er sjúkrahúsleiðslan.

Starvið er áramálsavmarkað til 6 ár og kann leingjast eftir umsókn.
Protokollat nr. 3 "Ansættelsesvilkår ved åremålsansættelse af lægelige chefer" í avtaluni millum "Amtrådsforeningen og Foreningen af Speciallæger", er eisini galdandi fyri hetta starv. Ískoytið smb. sama protokollat er í løtuni 8.565,39 kr. um mánaðin.

Starvið er sett inn á skalastig 52 smb. avtalu millum FAS og Fíggjarmálaráðið frá 19. september 2005.

**Fleiri upplýsingar**
Starvs- og virkislýsing fæst við at venda sær til Helenu Skaalum Mikkelsen, leiðsluskrivara, telefon 304500, lokal 1011. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Harri Guðmundsson, virkandi leiðandi yvirlækna, lokal 5124, t-postur hagu@lsh.fo, Tummas í Garði, læknastjóra, lokal 1002, t-postur tig@lsh.fo ella til Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, lokal 1003, t-postur marinv@lsh.fo.

Umsókn við navni á teimum persónum, har referansa kann heintast frá, skal fylgja við umsóknini.

**Umsóknarfreistin er** 1. oktober 2007.

## Bioanalytikari

Rannsóknarstovan á Landssjúkrahúsinum søkir eftir bioanalytikara til fast fulltíðarstarv frá 1. januar 2008, tilkallivakt heimanífrá.

Tvey avloysarastørv fyri bioanalytikarar í barnsburðarfarloyvi eru eisini leys at søkja til setan 1. januar 2008, annað til 31. oktober 2008 og hitt til 31. desember 2008.

Rannsóknarstovan húsast í nýggjum hølum og hevur góðar arbeiðsumstøður. Rannsóknarstovan er eitt integrerað laboratorium, har øll 5 serøkini innan bioanalytikarafakið eru umboðað, umframt ambulatorium á Landssjúkrahúsinum og á læknamiðstøðini í Runavík.

Í løtuni starvast á deildini uml. 20 bioanalytikarar, 2 skrivarar, 1 hjálparfólk og 1 patologur.
Allir bioanalytikarar skifta millum tey ymisku serøkini.

**Førleikakrøv**
- bioanalytikaraútbúgving
- góð samstarvsevni og fleksibilitetur

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Ivy Hansen, leiðandi bioanalytikara, lokal 5601, ivyh@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 15. november 2007 kl 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo